# Føroyingar í Bretlandi hittast til hugnaløtu í London

Saman við føroyingum í London (Faroe Island Solidarity Committee) fer føroyska sendistovan í London í næstum at skipa fyri einum føroyingakvøldi, har evnið verður "ein komandi oljuvinna í Føroyum". Ætlanin er, at tiltakið skal verða eitt evniskvøld, men samstundis eitt hugnakvøld har borðreitt verður við føroyskum mati.

Luttakarar á fundinum vera olju- og umhvørvismálaráðharrin, Eyðum Eltør, aðalstjórin í Olju- og umhvørvismálaráðnum, Herálvur Joensen, stjórin á Statoil Føroyar, Rúni M. Hansen og blaðstjórin á Sosialinum, Jan Müller. Føroyski sendimaðurin, John Rajani, fer eisini at nýta høvi til at greiða frá virkseminum á sendistovuni.

Tiltakið, sum er ásett at verða týsdagin tann 18. februar kl. 19.00, á Føroysku Sendistovuni, 55 Sloane Street, London, SW1X 9SR, er alment.

Í samband við, at føroyski umboðsmaðurin, Sofus Poulsen, í Aberdeen seinasta summar fór frá vegna aldur, er nýggj føroysk sendistova sett á stovn í London. Nýggjur føroyskur sendimaðurin er John Rajani. Sendistovan er í hølum hjá donsku sendistovuni í London.

Endamálið við sendistovuni er at fremja samstarv á øllum økjum ímillum Føroyar og Bretland. Tað vil siga politiskt, vinnuliga og mentunarliga. Til dømis svarar sendistovan fyrispurningum viðvíkjandi viðurskiftum í Føroyum og Bretlandi frá bæði vinnulívinum og privatpersónum. Sendistovan fylgir eisini gongdini í bretskum politikki og fremur uppgávur fyri landsstýrið í Bretlandi.

John Rajani, sendimaður sigur, at ætlanin er regluliga at senda út ymiskt kunningartilfar til fólk í Bretlandi við tilknýti til Føroyar. Til dømis er ætlanin at upplýsa um tiltøk í Bretlandi, sum sendistovan og onnur skipa fyri, eins og man vil kunna um viðurskifti, sum kunnu verða viðkomandi fyri fólk í Bretlandi við tilknýti til Føroyar. Um alt gongur eftir ætlan verður henda kunning send sum teldupostur til teirra, ið ynskja at móttaka hana. Tó fer at bera til hjá teimum, sum ynskja tað og sum ikki hava møguleika at móttaka teldubrøv at fáa kunning senda við vanligum posti.

Sendistovan arbeiðir eisini við at seta upp eina heimasíðu. Hetta arbeiðið væntast at verða liðugt seinni í vár og adressan verður: www.faroeislands.org.uk.

Adressan er annars henda: Sendistova Føroya í Bretlandi, 55 Sloane Street, London SW1X 9SR, UK
Tlf. +44 (0)207 333 0227
Fax +44 (0)207 333 6707
Email: faroes.mission.-uk@tinganes.fo

# Fløguupptøka í Sandavágs Kirkju



*Nicolina Jacobsen er farin undir at taka eina solofløgu við sálmum og sangum upp í Sandavágs Kirkju. Bróðursonur hennara, Ólavur Jakobsen, hevur guitarundirspæl til nøkur av løgunum*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Nicolina Jacobsen - Nicolina á Kamarinum - er farin undir upptøkurnar til eina fløgu, sum 12 sálmar og sangir vera á. Tikið verður upp í Sandavágs Kirkju**

TÓNLEIKUR
*Edvard Joensen*

**Sandavági:**
Tað er Nicolina Jacobsen - á Kamarinum - einsamøll, sum stendur fyri hesi fløguni, sum væntandi fer at koma út einaferð í vár.

Nicolina Jacobsen sigur, at her er talan um at gera ein gamlan dreym til veruleika. Henni hevur altíð dámt væl at sungið sálmar og sangir av hesum slagnum, hon nú tekur upp í Sandavágs Kirkju. Talan er um kend verk, sigur hon. Øll slík, sum vanliga verða sungin til guðstænastur ella møti.

At hjálpa sær við undirspæli hevur hon fingið urguleikaran Max Højgaard av Toftum og bróðursonin Ólav Jakobsen úr Havn. Ólavur spælir guitar og er millum annað kendur frá tónleikabólkinum Aldubáruni. Tað er Jónheðin Tróndheim av Argjum, sum stendur fyri tí tekniska í samband við upptøkurnar.

Nicolina sigur, at níggju sálmar higartil eru innspældir og skuldu verið reiðiliga lidnir.

At upptøkurnar verða gjørdar í Sandavágs Kirkju er ikki av tilvild, greiðir Nicolina á Kamarinum frá. Tað er ikki so heilt lítið av afturhvarvi - nostalgi - uppií, sigur hon.

Tað var abbi hennara, Magnus á Kamarinum, sum teknaði og stóð fyri bygginigini av Sandavágs Kirkju í 1917. Og sjónligt er, meðan vit standa inni í vøkru kirkjuni og práta um fløguna, at ikki heilt lítið av stoltleika av abbanum er at merkja. Bæði hjá Nicolinu og beiggjanum Eyðbirni, sum við er. Og heldur ikki langabbasonurin, Ólavur, er heilt óávirkaður av kirkjuni.

– Hon er ikki einans sjáldsom og vøkur, sigur hann, men hevur eisini rættiliga góðan akustik.








# Videoeftirlit ein spurningur um fólkaviljan

**Dávid Reinert Hansen, stjóri í Vágatunlinum, heldur, at tá talan er um ov høga ferð, er hetta ein spurningur um hugburð, og til spurningin um videoeftirlit í tunlinum sigur hann, at Vágatunnilin skal verða á sama støði sum hinir landsvegirnir, hóast tunnilin er privatur**

FERÐSLUTRYGD
*Theodor E. D. Olsen*



*Dávid Reinert Hansen leggur dent á, at hetta skal vera á sama støði sum á vegunum hjá tí almenna, men um tað skuldi hent, at samfelagið tók undir við videoeftirliti í tunlum, so hevði partafelagið einki havt ímóti tí*

Í viðtali við Sosialin leygardagin segði leiðarin á Ráðnum fyri ferðslutrygd, Jón Kragesteen, seg vera heitan talsmann fyri at brúka eftirlit við myndatóli, tá brot á ferðslulógina skulu revsast. Hann segði m.a., at aðrastaðni eru tey komin til ta niðurstøðu, at bilførarar verða rættiliga væl undirvístir, men fyri at náa tí sonevndu null-hugsjónini, ið merkir at eingin skal doyggja í ferðsluni, nyttar ikki bert at læra og upplýsa fólk. Neyðugt er eisini við eftirliti.

Koyrt verður ov skjótt allastaðni í landinum, og ein av teinunum, har hetta hendir, er í Vágatunlinum, sum P/f Vágatunnilin eigur og rekur. Dávid Reinert Hansen, stjóri í Vágatunlinum, heldur at spurningurin um videoeftirlit inniheldur nógvar fasettir, sum hann tekur til. Tað eru nevniliga nógvar orsøkir til at fólk koyra ov skjótt, og hetta hendir eisinI ymsastaðni í landinum. - Vit hava havt null-hugsjónina, og hana kunnu vit øll vera samd um, heldur stjórin í Vágatunlinum. Men hann sigur tað kortini vera eitt skeivt signal at hava sent út, tá okkara fólkavaldu samtyktu, at ov høg ferð skuldi revsast við treytaðari frádøming av koyrikortinum, og tað heldur Dávid Reinert Hansen hava elvt til, at miðalferðin er økt á landsvegunum í Føroyum, tí tú sært hvønn dag bilar, ið koyra omanfyri 110 km/t.

### Ein spurningur um hugburð

Dávid Reinert Hansen heldur fram og tosar um, hvat kann gerast við ta nógvu ferðina. Hann sigur, at politiið er ofta úti og til ber eisini at gera sokallaðar fysiskar forðingar sum t.d. oyggjar og hopp í bygdum øki, men á landsvegunum skal tað vera lætt og skjótt at koma fram, og tí eru hesir vegirnir í flestu førum breiðir. Hetta inniber, at bilføraranir sjálvir avgera, hvusu teir koyra, og tí er tað sambært Dávidi Reinert Hansen m.a. upp til hvat fjølmiðlarnir bera fram, hvat fólkahugsanin er, og sipar hann til m.a. til tað sum Sosialurin hevur skrivað um ferðslutrygd seinastu dagarnar, har eitt nú ein oddagrein talaði fyri videoeftirliti í Vágatunlinum. Men hetta heldur hann kortini ikki vera í samsvari við omanfyri nevnda signal frá Løgtinginum.

Tað vil siga, at spurningurin er, um vit sum samfelag kunnu góðtaka at hava videoeftirlit á vegunum, og er hetta altso ein spurningur í fleiri fasettum, ger stjórin í Vágatunlinum aftur vart við, og sigur, at hetta er ein spurningur um hugburð. Á øllum landsvegunum í Føroyum er Landsverkfrøðingurin vegamyndugleiki. Vágatunnilin er tó sum kunnugt privat ogn hjá Partafelagnum Vágatunlinum, og tí er partafelagið saman við løgregluni vegamyndugleiki undir Vestmannasundi og hava tey bæði í felag ábyrgd og eftirlit við skelting og øðrum í tunlinum.

Dávid Reinert Hansen leggur dent á, at hetta skal vera á sama støði sum á vegunum hjá tí almenna, men um tað skuldi hent, at samfelagið tók undir við videoeftirliti í tunlum, so hevði partafelagið einki havt ímóti tí. Sum nú er, er partafelagnum tó álagt somu treytir sum onnur, tá talan er um avmynding í sambandi við ferðmátingar, men kamera verða tó longu brúkt í Vágatunlinum. Hesi skulu eitt nú kanna eftir, at eingin koyrir uttan at gjalda, og tí avmynda tey bert nummarpláturnar, og ikki tey, ið sita í bilinum.

# Djurholm fyri videoeftirliti

**Prisnsipielt heldur Bjarni Djurholm tað vera skeivt at seta videotól upp á almennum støðum, men av tí ein undirsjóvartunnil er so serligur, heldur hann tað vera rætt at taka myndir undir Vestmannasundi. Somuleiðis heldur hann ikki revsingina í núverandi lóg vera nóg harða, tá talan er um ov skjóta ferð**

FERÐSLUTRYGD
*Theodor E. D. Olsen*



*Bjarni Djurholm heldur, at skilaleys loyring, sum viðhvørt kemur upp á eini 200 km/t, eigur at verða hart revsað. – Í slíkum førum røkkur okkara ferðslulóg als ikki til, og hetta má strammast upp, sigur Bjarni Djurholm. Revsingin eigur at samsvara við ta gerðina, sum er gjørd, ið viðhvørt kann føra til deyða og annan sorgarleik*

Bjarni Djurholm, samferðslumálaráðharri, heldur, at prinsipielt er tað ikki eitt gott hugskot at skráseta fólk, men um ferðin í undirsjóvartunlinum veruliga er so nógv, sum vit hava hoyrt í seinastuni, so mugu vit hinvgein siga, at ein undirsjóvartunnil er so mikið serligur, m.a. viðvíkjandi longd, og um ein vanlukka hendir, so eiga trygdarviðurskiftini at vera í lagi. Hetta krevur ein serligan útbúnað, og tann størsta uppgávan er sjálvandi at fyribyrgja óhappum, sigur Bjarni Djurholm.

### Harðari revsing

Landsstýrismaðurin sigur seg bert hava frætt um ta nógvu ferðina í millum øðrum Vágatunlinum í bløðunum, men um tað er rætt, sum Bjarni Djurholm málber seg, so eigur slík ferð, sum viðhvørt kemur upp á eini 200 km/t at verða hart revsað. – Í slíkum førum røkkur okkara ferðslulóg als ikki til, og hetta má strammast upp, sigur Bjarni Djurholm. Í slíkum førum átti revsingin at samsvara við tær gerðina, sum er gjørd, ið viðhvørt kann føra til deyða og annan sorgarleik, heldur landsstýrismaðurin.

Spurdur, um hann sum fólkaflokspolitikari metir hetta sum skerjing av tí persónliga frælsinum, sigur Bjarni Djurholm, at tað metir hann ikki. – Tað persónliga frælsið er eisini ábyrgd, og hetta inniber eisini, at tú vísir fyrilit fyri øðrum fólki, so at tú t.d. ikki tekur tað persónliga frælsið frá øðrum fólki, sigur Bjarni Djurholm.

Í løtuni arbeiða umboð frá m.ø. løgregluni, koyrilærarunum, Ráðnum fyri ferðslutrygd, Landsverkfrøðinginum og kommunum við viðgerðini av eini heilt nýggjari føroyskari ferðslulóg, sum skal vera í samsvari við lógaverki í ES. Væntandi verður uppskotið lagt fyri Tingið í endanum av næstu tingsetu.


